# Tá SMS boð gerast ein plága

**Fyritøkur og onnur hava fingið ein nýggjan, ókeypis og sera ómakaleysan hátt at marknaðarføra seg, nevniliga við at senda lýsingar sum SMS boð. Men hesin dreymurin hjá lýsaranum kann lætt gerast ein marra hjá móttakaranum, tí eingin føroysk lóg verjir fartelefonfelagar frá ágangandi lýsarum.**

LÝSINGARPLÁGA
*Rúnar Reistrup*

Í hesi vikuni hava at kalla allir føroyskir fartelefonfelagar fingið eini SMS boð, har ein konsertfyrireikari lýsir við, hvar atgongumerki til konsertina kunnu keypast, og hvussu nógv tey kosta.

Og undan býráðsvalinum fingu mong eisini SMS boð við áheitan frá einum valevni í Havn um at velja seg.

Men hetta higartil heldur sjáldsama fyribrigdi kann fara at vinda skjótt upp á seg, og hesin hátturin at marknaðarføra seg kann gerast ein rættilig plága fyri føroyskar fartelefonfelagar, um hann gerst meira vanligur.

Men framferðarhátturin er fult lógligur og eingin føroysk lóg so mikið sum avmarkar møguleikan hjá lýsarum at senda SMS boð til fólk.

## Ókeypis hjá lýsaranum

At ein fyritøka sendir eina lýsing sum SMS boð til eitt fartelefonnummar, sum kann sláast upp í telefonbókini, er í stóran mun líkt tí at senda lýsingar við postinum til hvørt húsarhald ella at ringja fólk upp. Tí er einki sum beinleiðis forðar hesum.

Men munurin er, at meðan tað er orkukrevjandi og kostnaðarmikið at ringja til fólk ella gera lýsingarbløð og bera tey í hvørt hús, nýtist tað ikki at taka einum lýsara meira enn ein lítlan tíma at senda SMS boð til allar føroyskar fartelefonfelagar. Og harafturat kostar tað ikki lýsaranum eina krónu at marknaðarføra seg á hendan hátt. Tað einasta í krevst eitt eitt lítið sindur av tekniskum kunnleika.



## Eisini til loynilig nummur

Umleið triðihvør føroyingur hevur fartelefon, og tað ber sostatt einum lýsara til at senda lýsingar til ein triðjing av føroyska fólkinum uttan at brúka so mikið sum eina krónu.

Líknandi marknaðarføring hevur leingi borið til ígjøgnum e-mail. Men tá krevst at lýsarin hevur adressurnar hjá viðskiftafólkunum, og tí krevur tað ikki so lítið av arbeiðsorku frá eini fyritøku, um hon ætlar at senda lýsingar út til til dømis ein triðjing av føroyska fólkinum.

Tá er nógv lættari at senda SMS boð. Tá er ikki neyðugt at kenna nøkur telefonnummur. At senda eini boð ígjøgnum internetið til eina fartelefon gerst við at brúka eitt e-post forrit. Er nummarið, tú ætlar at senda til til dømis 253488, so ber til at senda e-post til adressuna 253488@gsm.fo. Hesi boðini koma síðan til fartelefonina sum SMS boð.

Øll privat føroysk fartelefonnummur byrja við tølunum 21, 22 ella 25, og tí kann lýsarin fara systematiskt til verka og senda boð til 210000@gsm.fo, 210001@gsm.fo, 210002@gsm.fo og so framvegis.

## Ómakaleyst

Hetta kann tykjast eit sindur møtumikið, tí tað finnast tredivu túsund nummur, ið annahvørt hava byrjunartal 21, 22 ella 25. Men tað er tað ikki. Á internetinum ber nevniliga til at finna forrit, ið gera ein lista av e-post adressum útfrá einum intervalli av telefonnumrum.

Í hesi einføldu forrit skal brúkarin bert skriva, hvat interval av telefonnumrum skulu gerast til e-post adressur. Skrivar brúkarin so intervallið frá 210000 til 219999, ger forritið ein sokallaðan »mailinglista« við teimum tíggjutúsund e-post adressunum, ið kunnu gerast burturúr numrunum.

Lýsarin kann so skriva eini boð. Til dømis at »Hesa vikuna kostar høsnarungi bara 19 krónur« og senda tey í einum til øll tey tíggjutúsund fartelefonnumrini, ið hava byrjunartalið 21.

Tað hjálpir soleiðis ikki at hava loyniligt nummar á fartelefonini, tí boðini verða send til øll nummur. Eisini til tey, ið ikki eru í nýtslu.

## Eingin marknaðarføringslóg

Tá tað er so ómakaleyst at senda lýsingar sum SMS boð er vandi fyri, at føroyskir fartelefonbrúkarar fara at vera undirdýktir í einkisigandi SMS boðum, so hvørt sum fleiri fyritøkur gerast varugar við nýggja lýsingarmøguleikan.

Í Danmark setir marknaðarføringslógin mørk fyri hvat lýsararnir kunnu loyva sær, men í Føroyum finst eingin marknaðarføringslóg, og eingin lóg forðar sostatt lýsarum í at senda lýsingar sum SMS boð til fartelefonfelagar

Jógvan Thomsen, stjóri á Fjarskiftiseftrilitinum, kallar lýsingar sum SMS boð fyri eitt sera ivasamt slag av marknaðarføring.

– Einki juridiskt liggur til hindurs fyri hesum slagi av marknaðarføring, men tað stríðir ímóti teirri grundhugsjón, sum kemur fram í til dømis teirri donsku marknaðarføringslógini, um at fólk skulu hava møguleika at siga nei takk til at fáa lýsingar, sigur Jógvan Thomsen.

Tað bar okkum ikki til at fáa eina viðmerking frá Føroya Tele, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Føroya Tele er høvuðsstuðul hjá tiltakinum, sum lýst hevur verið fyri við SMS boðum farnu vikuna.

# Íløgufelag væntar sær nógv av 2001

**Árið 2000 gjørdist eitt tað ringasta árið fyri altjóða partabrævamarknaðin í longri tíð. Samstundis var tað í 2000, at tað fyrstu føroyska íløgufelagið, Kaupthing Føroyar, sá dagsins ljós. Eftir heldur hørðu byrjanina væntar Kaupthing nú betur útlit fyri sær og sínum viðskiftafólki.**

PARTABRÆVAHANDIL
*Rúnar Reistrup*

Vísitalið fyri amerikanska tøknimarknaðin NASDAQ fall við 40 prosentstigum í árinum 2000 og setti harvið botnmet. Árið frammanundan hækkaði vísitalið á sama marknaði við 85 prosentum, so hugurin at seta pening í amerikansku kunningartøknivinnuna var óvanliga stórur fyrstu mánaðirnar í fjør, tá trøini veruliga sóu út til at fara at vaksa inn í himmalin.

Men í mars mánaði í fjør vendi gongdin og eftir fáum døgum mistu nógv fólk nógvan pening. Hendan vánaliga gongdin stóð við og versnaði sum árið leið.

Hóast flestu av hinum partabrævamarknaðunum í heiminum ikki vórðu raktir eins hart og tøknimarknaðurin NASDAQ, so fullu vísitølini á flestu teirra mundandi. Eitt undantak var tó danski partabrævamarknaðurin, har vísitalið, tað sokallaða KFX indeksið, hækkaði við 23 prosentum í 2000.

## Hørð byrjan

Fyrsta føroyska íløgufelagið, Kaupthing Føroyar, gjørdist formliga virkið 1. mars og byrjaði soleiðis sítt virksemi, júst sum partabrævavirðini fóru at ganga skjótt niðureftir. Tískil gjørdist byrjanin eitt sindur harðari enn væntað, bæði hjá felagnum og hjá teimum viðskiftafólkunum, ið royndu seg sum partabrævaspekulantar.

Kring allan heim eru fólk vorðin nógv meira varin við at seta pening í partabrøv eftir skelkin á marknaðinum í fjør, og tað hevur rakt íleggingarfeløgini.

Men í ár fer helst at gangast betur enn í fjør á stóru partabrævamarknaðunum. Hetta skrivar Kaupthing í blaði sínum »Útlit og rák«, ið varð sent út í gjár.

Blaðið skirvar um vaksandi bjartskygni á marknaðinum í USA, sum mest av øllum kemst av, at amerikanski tjóðbankin valdi at lækka rentuna bæði einaferð seint í fjør og aftur tíðliga í hesum mánaðinum. At tjóðbankin lækkar rentuna plagar at skapa bjartskygni á marknaðinum og hava postiva ávirkan á partabrævavirðini.

## Keyp Vestas og Novo

Í blaðnum kemur Kaupthing eisini við tilráðingum til partabrævakeyparar um, hvørji partabrøv síggja út til at fara at hækka í virði komandi árið.

Danski vindmylluframleiðarin Vestas Wind Systems er ein av teimum fyritøkunum, ið hevur havt rættiligan viðvind í farna ári, og Kaupthing væntar, at hendan gongdin fer at halda fram.

Danska heilivágsframleiðaran Novo Nordisk hevur Kaupthing eisini eitt gott eyga á, hóast virði á partabrøvunum hjá hesi fyritøku er lækkað við einum lítlum fjórðingi farna árið.

Á altjóða partabrævamarknaðinum trýr føroyska íløgufelagið enn uppá kunningartøknivinnuna, hóast júst hendan minkaði so nógv í virði í fjør, at talan í roynd og veru var um eitt marknaðarkrakk.

Men tað ræður altíð um at seta pengarnar á rætta hestin, og innan kunningartøknivinnuna eru røttu hestarnir sambært Kaupthing teir, ið hava eina støðuga inntøku. Sum uppskot til íleggingar í hesum árinum nevnir íleggingarfelagið teldufyritøkurnar Intel, IBM og Sun Microsystems og fartelefonveitaran Vodafone.



# Lívsjáttandi at hjálpa misnýtarum á føtur aftur

**– Tað er ótrúligt at vera vitni til at síggja eina heila familju reisa seg aftur eftir nógv ár í rúsdrekkamisnýtslu. At gerast edrúur er eisini tað besta, sum er hent okkum, siga Carl August Arge og Lise Larsen, ið ætla undir slóðbrótandi rúsdrekkaviðgerð í Føroyum**

ALKOHOLISMA
*Turið Kjølbro*



*– Vit fóru til Svøríkis í 1989, men ætlaðu altíð at koma heim aftur. Nú er tíðin komin at venda heim aftur, siga Carl August Arge og Lise Larsen.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Seinastu ellivu árini hava hjúnini Lise Larsen og Carl August Arge arbeitt innan rúsdrekkaviðgerð í Svøríki, og í summar fara tey undir líknandi virksemi í Føroyum.

Viðgerðin, sum Lise Larsen og Carl August Arge arbeiða við, minnir um viðgerðina, ið fæst á Heilbrigdi. Ein avgerandi munur er kortini. Roynt verður at fáa fatur á rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarum, áðrenn avleiðingarnar av misbrúkinum eru vorðnar ov sjónskar. Av tí sama hava Lise Larsen og Carl August Arge við fyritøkuni Fenix í Svøríki ógvuliga góð úrslit at vísa á.

– Vit arbeiða eisini við avrúsing, men tað er ikki aðaltátturin í okkara virksemi, siga tey.

## Besta sum er hent

Tað eru 14 ár síðani Carl August Arge var í viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu.

– Tað er heilt einfalt tað besta, sum er hent mær. Tað er sum at verða føddur av nýggjum, sigur Carl August Arge.

Tað var skjótt, at hugurin til at hjálpa øðrum misnýtarum, spratt.

– Tá ið tú hevur fingið fástøðu til títt egna misbrúk, sært tú betur pínuna og hvussu onnur líða. Alkoholisma er ein tann størsti samfelagstrupulleikin í dag, hon kostar menniskjansliga og búskaparliga ótrúliga nógv, og eg vil fegin framhaldandi arbeiða við hesum fólkum. Tá ið tú sjálvur hevur verið misnýtari, hevur tú annað innlit enn ein, sum ikki er misnýtari, men tað er ein misskiljing, tá ið sagt verður, at tað er ein treyt fyri at arbeiða innan rúsdrekkaviðgerð. Tað fakliga skal eisini verða í ordan.

Síðani hava Lise og Carl August fingið sær nógvar arbeiðsroyndir, umframt skúlað seg innan rúsdrekkaviðgerð, og tað gera tey framvegis við at taka ymisk skeið og prógv. Lise hevur á hægri skúla lisið til rúsdrekkaráðgeva. Carl August hevur nomið sær eina altjóða útbúgving, sum ger, at hann kann starvast um allan heim innan rúsdrekka- og rúsevnisviðgerð. Umframt hevur hann eina serútbúgving fyri tey, sum detta ofta útí.

– Tá ið ein alkoholikari dettur út í aftur og aftur, nyttar sama viðgerð ikki. Tá ert tú noyddur til at velja eina aðra viðgerð og tað eri eg útbúgvin í at gera. Henda viðgerðin finst ikki í Føroyum í dag.

## Nógv tilboð

Í Svøríki eru nógvir viðgerðarstovnar og neyðugt er at gera eitt stórt arbeiði fyri at vísa á dygdirnar hjá hvørjum stovni sær. Tí hava viðgerðarstovnarnir ymisk tilboð at bjóða.

– Vit hava serliga arbeitt við ambulantari viðgerð. At vit royna at fáa fatur á teimum, ið ikki eru komin so langt í misbrúkinum, at alt annað í teirra lívi er farið fyri bakka, er í grundini tað øvuta, sum arbeitt verður við á viðgerðarstovnunum í Føroyum. Og úrslitini eru eisini hareftir. Fáa vit fatur á fólki, meðan tey eru partur av eini familju, hava arbeiði og hava góðan stuðul frá vinum og arbeiðsgevara, og hava enn ikki fingið álvarsligar heilsutrupulleikar, er møguleikin fyri, at viðgerðin eydnast góður. Millum 70 og 90 prosent av teimum, ið hava verið í viðgerð hjá okkum, eru framvegis edrú ella rúsevnisfrí hálvt annað ár seinni. Tí eru vit errin av, sigur Carl August Arge.

## Vaksin børn

Carl August og Lise hava serliga góðar royndir av at hava vaksin børn í viðgerð. Vaksin børn er eitt serligt hugtak í rúsdrekkaviðgerð. Tey eru fysiskt vaksin, men børn í tann mun, at tey ikki hava fingið ta umsorgan, børn hava krav uppá í uppvøkstrinum, tí tey eru vaksin upp hjá foreldrum, sum hava verið misnýtarar, og í avskeplaðum familjum. Og einki aldursmark er fyri, hvussu gamal ein tá kann vera fyri at koma í viðgerð.

– Vit hava tilkomin fólk í viðgerð, sum hava egið lív, men sum framvegis eru so merkt av ringa uppvøkstrinum. Tey kenna framvegis pínuna inn at kroppinum at vera vaksin upp við alkoholi, sigur Lise.

Tað er hugtakið SUDDS, ið liggur til grund undir viðgerðini, sum Carl August og Lise hava at bjóða. Hetta er eitt hugtak, sum verður brúkt undir meting og diagnosu. SUDDS gevur eina heildarmeting av persóninum og av trupulleikunum, ikki bert rúsdrekkatrupulleikanum, og viðgerðarin veit frá byrjan, hvat er av týdningi at arbeiða við í viðgerðini.

– Arbeiðshættirnir og tólini í dag eru so góð, at tað ber til, langt áðrenn nakað sæst á nakrari livraroynd, at staðfesta, um ein hevur rúsdrekkatrupulleikar ella ikki. Summi gerast ógvuliga bilsin, tá ið tey síggja úrslitið av eini slíkari roynd, sigur Carl August Arge.

Fenix vendir sær eisini til vinnulívið, jarðamøður, læknar, prestar, løgreglu og onnur. Fittur partur av virkseminum hjá stovninum hevur verið at fara út á arbeiðspláss at halda fyrilestur um rúsdrekkamisnýtslu. Avvarðandi hjá einum misnýtara er eisini arbeiðspláss og starvsfelagar.

– Tá tosa vit um, hvat tað merkir at hava ein starvsfelaga, sum hevur rúsdrekkatrupulleikar, og hvat ein kann gera fyri at hjálpa viðkomandi. Tað er sera umráðandi at taka alt netverkið hjá rúsdrekkamisnýtaranum við, tí eins og øll onnur er misnýtarin ikki til í einum avbyrgdum tómrúmi. Viðkomandi hevur nógv sambond og nógv av teimum eru ógvuliga sjúk av skomm og ótta til dømis. Vit siga jú, at konan ella maðurin hjá alkoholikaranum eru akkurát líka sjúk sum misnýtarin sjálvur. Tað snýr seg um at fáa alt netverkið at koyra aftur. Summi hava bert tørv á grundleggjandi upplýsingum, meðan onnur hava brúk fyri nógvari viðgerð, av tí at tey eru vorðin skadd av misbrúkinum, sigur Carl August.

– Avvarðandi hava verið ógvuliga glað fyri at komið til okkara, og ynskja at halda fram við at koma til okkara, hóast viðgerðin er liðug, sigur Lise.

## Skomm og fordómar

Størsti munurin á at arbeiða í Svøríki í mun til í Føroyum metir Carl August Arge er skommin.

– Rúsdrekkamisnýtslan har er líka stór sum í Føroyum, men skommin av at vera misnýtari í Svøríki er nógv sterkari enn í Føroyum. Har er nógv meiri vanigt, at fólk sita inni hjá sær sjálvum og drekka, enn at fara út. Og fordømingin er størri. Føroyar eru eitt lítið samfelag og øll skulu liva saman. Her er størri forstáilsi, tú verður lættari fyrigivin og góðtikin. Størri tolsemi verður víst teimum, ið misnýta. Vit kunnu vera ógvuliga hørð við hvønn annan, men vit fyrigeva eisini.

– Føroyingar eru meiri andaligir enn sviar. Í Svøríki legði eg mangan merki til, at fólk nærum onga vón hava, meðan føroyingar trúgva uppá sítt virði sum menniskju, sigur Lise Larsen.

## Fastlæstur rúsdrekkapolitikkur

Viðgerðarstovnurin hjá Carl August og Lise er í Hälsinglandi miðskeiðis í Svøríki. Afturat sær á stovninum hava tey havt lærlingar og hjálparfólk. Stovnurin hevur 6 búpláss og 4 pláss fyri fólk, sum búgva heima. Carl August og Lise meta, at nógvir fyrimunir eru við, at heimið er lítið.

– Øll verða sædd og fáa ta tíð, teimum nýtist í viðgerðini.

Um árið hava tey havt uml. 25 alkoholikarar, uml. 70 vaksin børn og næstrafólk í viðgerð, og uml. 100-200 onnur avvarðandi. Vanligi sjúklingurin er í viðgerð hálvan dag og til arbeiðis hálvan dag í seks vikur. Í eitt ár aftaná kemur viðkomandi eina ferð um vikuna á stovnin. Somuleiðis tey avvarðandi.

– Alkoholisma er ein djúptgangandi sjúka, har misnýtslan bert er toppurin av ísfjallinum. Hon situr ikki í fløskuni, men millum oyruni, og tí tekur tað langa tíð at fáa bilbukt við henni. Eftirviðgerðartíðin kundi væl verið enn longri, sigur Carl August Arge.

Tá ið Carl August og Lise fara undir viðgerðstovn í Føroyum, fara tey at arbeiða eftir sama leisti sum í Svøríki. Tey fara at virka fyri at byggja upp eitt netverk á formligum og óformligum grundarlagi av stovnum, virkjum og einstaklingum, sum kunnu samstarva í viðgerðini av sjúklingum. Avtalur verða gjørdar við familjuterapeutar, psykoterapeutar, læknar, prestar og onnur, um at standa fyri tí partinum av viðgerðini.

– Vit fóru til Svøríkis í 1989, men ætlaðu altíð at koma heim aftur, tí okkara røtur eru her. Í kreppuárunum var vónleyst at koma aftur, tíðin gekk, vit stovnaðu okkara egnu fyritøku, men nú er tíðin komin at koma aftur, siga Carl August og Lise.

Tey hava verið í sambandi við almennu myndugleikarnar í Føroyum og kunnað tey um, hvat slag av viðgerð, tey ætla fara undir í Føroyum.

– Út frá teimum fundum meta vit, at stórur tørvur er á viðgerðini, vit hava at bjóða. Rúsdrekkapolitikkurin í Føroyum er læstur fastur í tveimum stovnum, sum standa nevndir við navni í fíggjarlógini. Ístaðin átti peningurin at fylgt við sjúklinginum, men hetta er ikki nakað, sum verður broytt við eini handvend. Tí fara vit ikki at dúva uppá tað almenna. Vit kunnu ikki gera annað enn at fara út at sannføra arbeiðspláss og onnur um okkara tilboð, eina viðgerð sum virkar. Vit koma ikki við tí endaligu loysnini, ivaleyst gera tey, sum arbeiða við rúsdrekkamisnýtslu í Føroyum eitt gott arbeiði, men hon kundi virkað betur. Nógv hendir á økinum alla tíðina og tað ræður um at fylgja við. Rúsdrekkamisnýtsla er torfør at arbeiða við. Tí er brúk er fyri væl skúlaðum fólki. Vit hava neyðugu fortreytirnar at bjóða eina viðgerð, sum virkar, siga Lise Larsen og Carl August Arge at enda í viðtali.